

# Færri lærarar við útbúgving

Í Grønlandi eru landsstýrið og læarafelagið ósamd um, hvussu tað stendur til við lærarum í grønlendska fólkaskúlanum. Landsstýrið sigur, at talið á lærarum við læraraútbúgving hevur verið veksandi tey seinastu fýra árini, men hesum vísir lærarafelagið aftur. Sivso Dorph, formaður, sigur við KNR, at landsstýrið hevur rætt í, at fleiri lærarar hava útbgúgving nú enn í 2004, men at uppgerðin hjá landsstýrinum er misvísandi, tí hon umfatar ikki øll, sum vóru lærarar í 2004. Verða øll tald við, eru lutfalsliga færri lærarar við útbúgving nú, sigur hann.

---



*Málningur sum var avdúkaður á móttøkuni. Málað hevur Heðin Kambsdal. Osmundur Justinussen segði, at hetta var júst, sum hann mintist Kára. Ein oljuplett á pannuna og eitt lítið smíl, tað eydnaðist enn eina ferð!*

Samuelsen úr Fuglafirði fyrsti lærlingur hjá Kára. Tilsamans hevur virkið havt 80 lærlingar.

Virksemið helt á at økjast og fleiri fólk komu í arbeiði. Tað gjørdist ov trongt í kjallaranum. Loysnin var at byggja, og hetta varð gjørt í Kambsdali, hagar tað var flutt í 1988. Tá vóru nýggju fólk knýtt at virkinum. Húsið var 600 fermetur. Í kaffistovuni var hill sett upp, har bíblia og sálmabók fingu sítt pláss. Fólk vistu, hvar tey høvdu Kára á tí økinum.

Í 1988 verður virkið gjørt til partafelag, og virksemið helt á at økjast. Fyrstu árini snúði virksemið seg fyri ein stóran part at fáa trolspølini at virka. Hetta var ein tíð við stórari menning av flotanum ikki minst trolara- og garnaflotanum. Her eru spølini sera umráðandi.

Altíð vóru boð eftir Kára. Einaferð hann bíðaði eftir flogfari í Vágum, varð boð sent eftir honum til ein trolara í Sørvági, har trupuleikar vóru við spælinum. Hann fekk tá karm av olju, og mátti í skundi til skraddaran á Vantsoyrum at fáa nýggj klæði.



*Jón Eliasen var fyrsti maður á fyritøkuni umfram Kára sjálvan*

## Útvegaði arbeiðspláss í Rumenia

Nú kemur kreppan í 90-unum. Hon rakar eisini Kára. Minni var at gera og verri var at fáa pengar inn. Nógvir pengar vóru eisini mistir. Men Kári kom undan kreppuni, eisini við lagaligheit frá starvsfólkinum.

Virksemið varð eina tíð víðkað til Hydro Tech á Eiði. Her varð millum annað framleitt alibátar, og eisini tvíkiljur, sum vóru ein rættulig nýhugsan. Steðgur kom í framleiðsluni undir alikreppuni, men nú verða tær aftur framleiddar í Klakksvík.

Kári var eisini við í skiparaksti. Hann var ein av eigarunum av Boðasteini, sum rættuliga gjørdi vart við seg á búrfiskaveiðu.

Kári var eisini við til at seta virksemi í gongd í Rumenia. Á eini ferð við hjálp til illa staddar rumenarar kom hann í samband við ein lokalan smið. Teir avráddu, at hesin skuldi framleiða alibesløg til nýtslu í Føroyum. Hetta hevur skapt 12 sera tiltrongd arbeiðspláss í hesum fátæka landinum.



*Kári í prát við Erling Olsen, fyrrverandi fólkatingsformann*

## Hóttafallið

Lillian ger nógv av at greiða frá, hvussu Kári var sum maður og pápi. Børnini, Sólva, Viggo og Bergur skriva eisini hugtakandi um pápan. Saman umtikið kann sigast, at hann var framúr eisini sum maður og pápi, hóast alt sum hann hevði um at vera. Hann hevði ongantíð so nógv at gera, at hann ikki hevði tíð til børnini.

Lillian sigur, at Kári var góðsligur av lyndi. Men hann var sera treiskur. Hann gavst ikki við eini uppgávu fyrrenn hon var loyst.

Eisini skriva nógv av teimum, sum høvdu viðurskifti við Kára, um hann í bókini. Her er myndin tann sama. Álitismaður í odd og egg.

Men nú sum alt gongur av tí besta, kemur hóttafallið. Seinast eg sjálvur hitti Kára var í februar 2001, tá eg var á vitjan í Kristnastovu í Keypmannahavn saman við Erlingi Olsen, fyrrverandi fólkatingsformanni. Teir prátaðu væl saman, og Kári greiddi frá sínum virksemi, sum Erling eisini var hugtikin av.

Tað var ein hvøkkur stutt eftir at hoyra, at Kári hevði fingið ikki minni enn deyðadóm frá læknunum. Mest kensluborni reglurnar í bókini eru hesar:

"Læknarnir søgdu, at teir als einki kundu gera fyri at forða sjúkuni, og viðgerð fekst eingin. Hann tók støðuna, sum hon var, og legði alt í Guds hond. Hann tosaði opið um sína sjúku og royndi sum frægast at avgreiða tað hann kundi."

Hann andaðist 27. august 2001.




*Ein lívsjáttandi bók*

Formaður í nevndini er Árni Skaale. Hann skrivar millum annað í fororðinum til bókina:

"Fyri meg persónliga hevur Kári Johannesen eisini havt stóran týdning og hevur verið ein fyrimynd. Hann var erligur og óhátíðarligur, hann var ein framúr teknikari, og hann var góður handilsmaður, hóast hann mangan tók menniskjaligu atlitini fram um handilsskapin í sínum virksemi.

Eg var hugtikin av Kára, tá ið hann var virkin maður í góðum árum, men eg var minst líka hugtikin av, hvussu hann livdi sína seinastu tíð og doyði. Hann avgreiddi alt, sum lá honum á hjarta, á ein ósjálvsøknan hátt, áðrenn hann doyði, og hann gav sær altíð góðar stundir til onnur, hóast tað stóð illa til hjá honum sjálvum."

## Lívsverkið stendur við

Umframt at vera smeitur fyri familjuna, var hetta eisini ein stórur smeitur fyri virkið, sum nú misti sína fremstu drívkraft og nógv av sínum serkunnleika. Men sum nýggi stjórin Ólavur Asafsson Olsen segði: "Eingin av okkum megnar einsamallur at taka yvir partin hjá Kára, men saman megna vit tað."

Soleiðis kom tað eisini at gangast. Virksemið øktist, og í 2006 kom eisini ein deild í Havn. Tað er eisini eydnast at fáa ISO góðkenning.

Í dag er KJ Hydraulik eitt virki við trimum høvuðsdeildum: søla, umsiting og teknisk deild. Virksemið er sera fjølbroytt. Roynt verður at menna fólkið við innanhýsis skeiðum. Úrsltið er eisini at fólk trívist. Í dag eru 70 fólk, sum arbeiða á fyritøkuni.

Í dag eru tað Lillian og hennara børn, sum eiga fyritøkuna, men sjálv er Lillian "bert" skrivstovukvinna á fyritøkuni. Professionellar nevndir og leiðarar standa fyri rakstrinum. Men sjálv er Lillian nevndarlimur.

Øll henda søgan sigur eisini, at Lillian er eisini ein merkisverd kvinna. Hon eigur eisini tøkk fyri at hava skrivað hesa bók, sum kemur at standa sum eitt virðiligt minni um merkismannin Kára Johannesen.

Ynskt verður teimum góða eydnu framyvir.

ó